# Bingjupláss í Vági

**Broyttar upplatingartíðir á binguplássinum frá 1. mai 2006.**

| Dagur | Upplatingartíðir |
|---|---|
| Mánadag | Frá kl. 17.00-19.00 |
| Týsdag | Stongt |
| Mikudag | Frá kl. 17.00-19.00 |
| Hósdag | Stongt |
| Fríggjadag | Frá kl. 17.00-19.00 |
| Leygardag | Frá kl. 14.00-18.00 |

**Vágs Býráð**

# Koyri-kort?

Teoriskeiðið til persónbil, byrjar týsdagin **2. mai kl. 17.00**

Teoriskeiðið til lastbil og trailara, byrjar mikudagin **3. mai kl. 17.30**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn

## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 27. apríl 2006, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Handskavirkið á Skipanesi**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**

**Halgir Winther Poulsen, adv.**
**Fríða Patursson, adv.**
**Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.**
**Christian Andreasen, adv.**
**Niels Winther Pouslen, adv.**
**Jógvan E. Winther Poulsen, adv.**

Tlf. 311145 · Telefax 31 15 25
e-mail: jura@jura.fo

# Hús á Skála



Vegna Føroya Skiftirætt verður sethúsaognin matr. nr. 394, Skála við hesum lýst til sølu.

Grundøkið, sum ikki er víddarroknað, er uml. 380 m$^2$ til støddar.

Húsini eru uml. 45 m$^2$, kjallari og ein hædd. Húsini eru bygd miðskeiðis í 1960'unum.

Stovuhædd: Gangur, køkur millumgongd, 2 kømur, sovikamar og stova.

Kjallari: Í kjallaranum er innrættað wc. Restin er kjallaratún. Gólvið er stoypt.

Skiftirætturin tilskilar sær rætt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

Nærri upplýsingar um ognina fáast frá

**Advokatskrivstovuni**
**Fr. Petersensgøtu 9**
**Tlf. 311145 · Telefax 31 15 25**
**e-mail: jura@jura.fo**
Att: Fríða Patursson, adv. frp@jura.fo
ella skrivaran maj@jura.fo

# Reingerðishjálp

Reingerðishjálp søkist.

**Advokatgarðurin**
Tlf. 311744

# Starv í fíggjarumsitingini

Landsbankin søkir eftir einum fólki til fíggjarumsitingina at byrja skjótast gjørligt

**Arbeiðsuppgávur:**
- Íløgur og peningamarknaður
- Gjaldførisrøkt
- Peningastovnsavgreiðslur
- Back-office
- Roknskapur og fíggjarætlan

Uppgávurnar í bankanum eru býttar í arbeiðsøki, men stovnurin er lítil og uppgávurnar breiðar. Tí verður nógv arbeiði gjørt í verkætlanum, eins og tað er skiftandi.

**Førleiki:**
Praktiskar royndir og viðkomandi útbúgving eru neyðugar.

**Løn:**
Eftir avtalu við støði í sáttmála við avvarðandi fakfelag.

**Tíðarfreist o.a.:**
Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Sigurd Poulsen, stjóra, tel 308126 sigurd@landsbank.fo ella Jens Erik Magnussen, undirstjóra, tel 318122 jem@landsbank.fo um fleiri upplýsingar.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við neyðugum upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir sendast landsbankanum áðrenn 19.05.2006 kl. 16.00.

**LANDSBANKI FØROYA**
Governmental Bank
Müllers Hús - Gongin
Postrúm 229 - FO-110 Tórshavn
E-postadr.: landsbank@landsbank.fo

*Landsbanki Føroya er bankasamband landsins. Hann umsitur gjaldføri og stendur fyri lántøku landsstýrisins og samstarvar við aðrar myndugleikar og almennar stovnar.*

*Landsbankin virkar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í landinum. Bankin skal tí halda seg kunnaðan um fíggjarmarknaðarviðurskifti og samstarva við fíggjarstovnar og landsstýrið um hesi viðurskifti. Lýsingar av búskapinum eru týðandi liður í hesum uppgávum. Sí eisini heimasíðuna landsbank.fo*

# Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við



Hey, - vit eru tveir hvølpar (Westie) West Higland White Terrier (ektair) sum eru til sølu.
Vit eru 10 vikur gamlir. Vacc. og chip.

**Ring 51 71 00**